# H71

HOYVÍKSHØLLIN

## HEIMA Í HOYVÍK

KAPPINGARÁRIÐ 2019 - 2020



FALDARI 2 SUNNUDAGIN 27. OKTOBER 2019

adidas

## SMS-KVINNUR H71 - KYNDIL KL. 14.00

Auto Service
BONUS ...er biligari!
J&K
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

# ÓSIGRAÐAR Á ODDA

Eins og undanfarna ár, eru kvinnur okkara aftur í ár ósigraðar eftir fyrstu fimm umførini av landskappingini. Við 10 stigum eftir fimm dystir liggja vit soleiðis á odda í deildini, nú vit standa fyri at møta grønu greipuvinnarunum frá í fjør.

Kyndilskvinnur tykjast aftur í ár formsterkar, hóast tær snávaðu í Klaksvík og mistu tvey stig í ósigri ímóti Stjørnuni, og eingin ivi er um, at kyndilskvinnur aftur í ár eru kandidatar til at gerast greipuvinnarar.

Hópur okkara er nakað tann sami sum undanfarna ár, men Sofie Søberg Larsen er komin aftrat. Við vinstrahondsskoti og kropsligu styrki síni styrkir hon avgjørt um verju og breidd á liðnum. Evnini hjá okkara leikarum eru framúr, og allar eru tær nú eitt ár eldri og royndari, og neyðugt er jú við royndum, skal eitt oddalið spyrjast burturúr. Millum annað síggja vit, at fleiri bjóða seg fram, tá ið lyklaleikarar verða mansvardir, og eisini er tolnið í tvørligum støðum størri nú.

Onkursvegna er komandi dysturin ímóti Kyndli ein styrkisroynd fyri form okkara í ár. At byrja við í kappingini eru liðini gjarna meira trilvandi og úrslitini kanska meiri tilvildarlig, men nú er gongd komin á kappingina og liðini hava kanska funnið seg sjálvan og sítt spæl.

Tað var júst um hetta mundið í fjør, at kvinnur okkara steðgaðu nakað upp og mistu avgerandi stig fyri at halda seg í oddinum. Hini liðini funnu útav, hvussu leikast skuldi ímóti okkum og vit áttu ikki breidd og royndir til at gera neyðugu móttrekkini. Vónandi er tann støðan broytt í ár, so vit hava lært at spæla okkum burtur úr mansverjum og líknandi.

Kyndil hevur í vikuni verið í Vestmanna og spælt ímóti VÍF, sum var í bæði steypa- og FM-finalunum síðsta kappingarár, men tað úrslitið kenna vit ikki í skrivandi løtu. Tað eigur tó ikki at hava nakað at siga fyri henda dystin, tí H71 kann bara ávirka sínar egnu dystir.

Megna okkara kvinnur at hugsavna seg fult og heilt um sín dyst og sítt spæl, ber alt til, og tí er tað við góðum treysti, at vit taka ímóti greipuvinnarunum úr Kyndli. Vit vóna fyri okkara part, at H71 stendur royndina og fær staðfest góða formin og góðu gongdina higartil.

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Erland Jensen
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent

BANKNORDIK

# Lær við Vitusi og Bubu

banknordik.fo/vitus






*Okkara umboð á kvinnulandsliðnum avmyndaðar eftir dystin ímóti Rumenia. Vintrumegin frá eru tær Maria Halsdóttir Weyhe, Durita Toftum Joensen, Annika Fríðheim Petersen, Marita Mortensen og Guðrið á Borg*

# FIMM Á LANDSLIÐNUM

Tá ið føroyska kvinnulandsliðið síðst í september spældi fyrst á útivølli ímóti Polandi og síðani á heimavølli ímóti Rumenia, var H71 best umboðaða felag í hópinum við fimm spælarum: Anniku Fríðheim Petersen, Mariu Halsdóttir Weyhe, Maritu Mortensen, Duritu Toftum Joensen og Guðrið á Borg.

Annika var kosin besti føroyski spælari ímóti Rumenia, tá ið hon eisini sum besti málverji kom á EHF-liðið tað umfarið, og Marita Mortensen var kosin besti føroyski spælari ímóti Polandi, umframt at Maria var toppskjútti í báðum dystunum.

At vit hava fimm spælarar á kvinnulandsliðnum, er fyri okkara viðkomandi hondbóltssøga, tí á gentu- og kvinnusíðuni er hondbólturin ikki so gamal og siðvandur í H71, sum hann er tað á dreingja- og manssíðuni. So mikið hugaligari, at fleiri av okkara kvinnum fingu væl av spælitíð og settu síni fingramerki á føroyska spælið.

Tá ið gentur 10 í 2011 vunnu felagnum ta allarfyrstu greipuna á gentu- og kvinnusíðuni, vóru bæði Maria og Marita við, og eisini hava Annika og Durita verið meistarar við H71, sum higartil tilsamans 23 ferðir hevur verið gullvinnari í lands- og steypakappingunum í árgangunum frá gentum 10 upp til gentur 18.

NORÐOYA SPARIKASSI

# Skalt tú keypa hús ella íbúð?

Tosa við okkum um fígging




ns.fo

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 Fax 47 6015 ns@ns.fo


www.torshavn.fo
Skapandi, mennandi, kveikjandi
TÓRSHAVNAR
KOMMUNA


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

# EGINSTUÐLAR HJÁ

TATANKA

LAIDERZ

SALMON PROTEINS

LBF

SMJ | RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR

PRISMA

AUTO TAXI

bilrokt.fo

# H71 TAKKAR

# H71 KVINNUM

SMYRIL LINE
EXPLORING OF THE NORTH ATLANTIC

TUR.FO

magn

VØRUHÚSIÐ

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

FAROE SHIP

ADVOKATSKRIVSTOVAN

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

# FYRI STUÐULIN




javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 208090
javni@javni.fo
www.javni.fo

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum
www.andreasen.fo

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT

# VOLVO XC40



*Bilurin á myndini verður vístur við eyka útgerð







**PRÍSUR ÚR**

# 398.000,-

**+ LEVERINGSKOSTNAÐ**

**LEITAR TÚ EFTIR DREYMABILINUM?**

Hevur tú altíð droymt um ein bil, sum ikki er ov stórur, men alíkavæl rúmar nógv og har snið, tøkni, hentleikar og trygd ganga upp í eina hægri eind? – Ja, so er hetta dreymabilurin. Ger dreymin til veruleika! Kom og royn hann hjá P/F Wenzel, Volvo umboð í Føroyum.

Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00

VOLVO

**WENZEL.FO**




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn




# HOYVÍK – EIN HONDBÓLTSBYGD Í EVROPA

Enn eitt risalop varð tikið í teirri stóru menningini hjá H71, nú besta manslíðið á fyrsta sinni tók lut í Europa Cup og vann sín fyrsta dyst. Alt felagið stóð royndina til UG. Vónin er, at bæði kvinnur og menn fara at spæla í evropeiskum kappingum komandi árini – og at sláa fast, at tað at spæla við H71 er eisini vegurin út í heim

*„ ... stoltur ungdómur ber førning fram á leið.*
*Inn í hallir, út um heim tey leita vilja,*
*tó til Hoyvíkar sítt upphav gloyma ei.“*

Soleiðis ljóðar í sanginum, "Kvøða til Hoyvík", sum varð yrktur í sambandi við, at Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002.

Og tað, sum var ein dreymur á pappírinum tá, er sanniliga gjørt til veruleika síðani. Tann menning, ið er farin fram í H71 og í føroyskum hondbólti hesi seinastu árini, er eitt "kvantulop", ið vit kanska ikki veruliga høvdu torað at ímyndað okkum.

Felagið meldaði í ár á fyrsta sinni til at taka lut í Europa Cup við besta manslíðnum. Vit fingu eitt torført lutakast í Challenge Cup, sum okkara kapping kallaðist, og skuldu kappast við slovenska liðið, RK Maribor Branik. Nevndin fekk skilvíst í lag, at báðir dystir skuldu leikast í Føroyum.

### Felagið riggaði framúr væl

Og hóast vit noyddust at leika dystirnar niðri í Havn, so stóð alt felagið samanumtikið ta fyrstu evropeisku royndina til UG.

Vit vunnu okkara fyrsta evropeiska dyst við okkara blaðunga liði, 25-24, eftir at hava

***Framhald á síðu 16***

ANNIJANNI

FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika
- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á – NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanki** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja okkum í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR SPARIKASSI



leiðslu heilt upp í sjey mál í seinna hálvleiki. Og at vit veruliga iðra okkum – ikki minst leikarar og venjarar – um at vit taptu seinna dystin 31-24, sigur okkum hvønn vilja og hvat støði, ið H71 og føroyskur hondbóltur miðar eftir og krevur í løtuni.

Okkara áskoðarar vóru genialir. Teir ungu við trummum og herrópum løgdu leiðina. Og sambært slovenska venjaranum, vóru áskoðararnir og tað trýstið teir løgdu á, millum tað mesta, hann hevði upplivað.

Nevndin og eitt stórt lið av hjálparfólkum tók sær ikki bert av væl fyriskipaðum dystum. Men leikarar frá báðum liðum bæði vandu, fyrireikaðu seg og fingu sínar høvuðsmáltíðir í Hoyvíkshøllini.

Seinasti náttturðin hjá slovenum var nýskorið, stokt toskaflak, ið Petur Sivertsen skar av fonginum, ið hann hevði fiskað við "Greipuni" sama dag. Slovenarnir, ið søgdu seg ikki vera vanar at eta fisk, skírdu hetta at vera marglætismat. Og somu góðu skoðsmál góvu teir allari fyriskipanini og blíðskapinum hjá H71.

## Grundin er løgd

At H71 nú tekur lut í evropeiskum hondbólti, er enn eitt úrslit av teimum høgu málum og tí professionellu fyriskipan við einum sterkum felagsskapi aftanfyri, ið leiðsla, venjarar og leikarar hava sett.

Í Partille Cup í Svøríki hava bæði gentur og dreingir hjá H71 gjørt álvarsliga vart við seg seinastu 10 árini.

U15 dreingirnir hjá okkum vunnu Lundspelen í Svøríki í 2017 – og teir vóru bulurin á einastandandi úrslitinum hjá føroyska U17 landsliðnum, sum vann European Open í ár. Teir hava nærum verið heilt lið í Danmark og spælt í við oddaliðunum í sínum árgangi seinasta kappingarár. Nú hava vit nakrar teirra heima aftur, men teir eru eftirspurdir av fremstu hondbóltsfeløgum í Evropa.

Á manslandsliðnum hava H71-leikarar, ið summir nú eisini spæla uttanlands, verið bulurin síðani endaspælið hjá U21 í Algeria.

Okkara ungu kvinnur liggja nú í oddinum í bestu kvinnudeildini, og H71 hevur nú fimm leikarar á kvinnulandsliðnum, ið fingu so gott úrslit ímóti Rumenia seinast.

Vit eru knøpp 4.000 fólk í Hoyvík nú. Men H71 er eitt felag og hevur leikarar, sum bæði við H71, á landsliðum og í feløgum kring í Evropa, eru í ferð við at sláa seg fastar á hondbóltskortinum í Evropa og í heiminum.

Tað er rættiliga einastandandi. Tí er vónin, at H71 við bæði kvinnum og monnum komandi árini fer at taka lut í evropeiskum kappingum, tá ið vit megna at vinna okkum møguleikan.

Soleiðis kunnu vit halda fram við menningini og geva okkara leikarum, venjarum, leiðslu og øllum hjálparfólkum ta støðugu avbjóðing at vera ein framúr hondbóltsbygd í Føroyum, í Evropa og í heiminum.

**Høgni Hoydal**

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

fk




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN

# 3 hálvleikur í Angus



**Bílegg borð á tel. 717777**

Vit svara millum kl. 11.00 og 22.00

**Vit stuðla kvinnuliðnum hjá H71**



ANGUS
STEAKHOUSE



Mynd: Gudmund Helmsdal


LAIDERZ

*Fokus på sportsfaciliteter*

# HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.

**Graslíkisslag: JUTA MASTER 40/200 á EL25**



www.laiderz.dk



**VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI**

*Alt til* ***HITA SANITET & VENTILATIÓN***

**Maria Poulsen & Co**

**Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000**




HF

HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

# REINAR TENN BRENNA IKKI



## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25






## Visti tú at...

Vit ala á harðbalnum økjum fyri ikki at dálka umhvørvið.

Vit skapa og menna heimsins mest burðardyggu mannagongdir at ala laks.

HiddenFjord laksur svimur úr sjónum til góðskingarvirkið fyri ikki at gerast strongdur.



HiddenFjord laksur livir í einum av heimsins reinastu høvum við røttum sjóvarhita. Hetta er natúrliga umhvørvið hjá villa atlantiska laksinum.

Vit leggja stóran dent á at ala ein natúrligan laks uttan antibiotika og hormonir.

HiddenFjord laksur smakkar sera væl og er stak heilsugóður.

*Manningin hjá RK Maribor Branik í góðum hýri á liðmynd eftir seinna dystin ímóti H71. Aftast høgrumegin frá sæst dagligi leiðarin, Mihael Pisanec, ið leikskráin hevur tosað við*



# ØLL SO FITT OG GESTABLÍÐ

**Slovensku gestirnir hava alt gott at bera Føroyum og føroyingum eftir teir báðar europeisku dystirnar ímóti H71 fyri tveimum vikum síðani**

"Lutakastið til EHF Challenge Cup kom sum ein skelkur fyri okkum, tí vit høvdu vónað, at vit fingu eitt lið í onkrum av okkara grannalondum. Føroyskan hondbólt kendu vit lítið og einki til, og vit vistu so slett einki um H71."

Orðini eigur dagligi leiðarin í RK Maribor Branik, Mihael Pisanec, tá vit nakrar dagar eftir teir báðar europeisku dystirnar í høllini á Hálsi fáa hann at greiða frá, hvussu slovensku gestirnir upplivdu dystirnar og vitjanina í Føroyum.

"Fyrst og fremst vóru øll so vinarlig og gestablíð, og tað merkti eg beinanvegin, tá ið eg fór undir at samskifta við forkvinnuna í H71, Annu Dam, um dystirnar. Tað var eitt

álitisvekjandi samskifti, ið skjótt sannførdi meg um, at alt var í sera góðum hondum," sigur Mihael Pisanec.

"Og hóast vit bjóðaðu okkum til at hýsa báðum dystunum, tí tað fór at vera bíligari fyri báðar partar at spæla dystirnar á einum stað, fekk hon sannført okkum um, at báðir dystirnir heldur skuldu spælast í Føroyum. Hon vísti á, at tykkara áskoðarar hungraðu eftir at uppliva europeiskan hondbólt, nú tykkara felag fyri fyrstu ferð var við í europeiskum dystum, so nú aftaná eru vit bara fegnir um, at vit kundu vera við til at gera tað møguligt hjá tykkum."

### Høvdini í blot

Hann sigur, at bæði spælararnir og alt fólkið rundan um liðið fingu eina ógloymandi uppliving, ið nógv fer at verða tosað um í komandi tíðum, tí hetta gjørdist ein serstøk og sera góð ferð. Umframt góðan mat og bestu umstøður, góvust stundir til útferðir og annað, ið gjørdi ferðina so framúr góða.

"Vit høvdu frammanundan tosað um, at ferðin til Føroya skuldi vera ein serligur ágóði til okkara spælarar, men eg hugsi ikki, at nakar okkara hevði droymt um, at tað skuldi gerast ein so góð ferð," sigur Mihael Pisanec, ið tó viðgongur, at fyrri dysturin gjørdist skelkur hummar tvey.

"Sum sagt, so kendu vit einki til H71, men her komu nakrir spælarar á vøllin, ið vóru bæði styttri og lættari enn okkara, og so vóru teir sera kvikir. Við sínum norðurlendska spælistíli, ið vit ikki kenna so nógv til, løgdu teir okkum undir eitt øgiligt trýst og vunnu fyrra dystin uppiborið."

Pisanec sigur, at hetta veruliga fekk teir í RK Maribor Branik at leggja høvdini í blot, so teir kundu fáa vent gongdini til seinna dystin. Sum kunnugt, eydnaðist tað eisini, men hann sigur, at venjarin, Marko Sibila, veruliga mátti grava djúpt í sínum taktiska kunnleika fyri at fáa liðið at røkka á mál.

Í triðja umfari í EHF Challenge Cup skal RK Maribor Branik hálvan november spæla ímóti portugisiska AM Madeira Andebol SAD.

**Dear Anna Dam and all of the H71 handball family,**

RK Maribor Branik would like to thank you for your hospitality in the last couple of days. You made us feel like home and helped us in every possible way. We would like to thank you and at the same congratulate you for great job in organizing both matches. You truly are a big handball family and your commitment is really inspiring.

We wish you a successful season and a lot of good luck in the future.

*Takkarskrivið, ið RK Maribor Branik sendi H71, eftir at slovenska ferðalagið var komið heimaftur.*


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór


FÖROYA BJÓR Í HOYVÍK
Karlamagnusarbreyt 17
OPIÐ
Hósdag kl. 13.00 - 18.00
Fríggjadag kl. 13.00 - 19.00
Leygardag kl. 13.00 - 16.00

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO






**Active Info Display**
Tann analogi ferðmálarin er avoldaður. Við eykaútgerð kanst tú fáa skift tey siðbundnu rundu instrumentini út við einum talgildum skíggja í høgari upploysing. Nýskapandi instrumentbrettið gevur tær møguleikan at síggja nógv meira enn bara ferðina og brennievnisnýtsluna.

**Infotainment**
Uttan mun til um tú ynskir at ringja til onkran, meðan tú koyrir, at fáa upplýsingar um ferðsluna, at koma fram á mál við hjálp av navigatiónskipanini, ella bara ynskir at lurta eftir egnum tónleiki – tín Golf hevur eitt hav av møguleikum at bjóða tær við nútímans tøkni á ein lættan og greiðan hátt.

**Bilasølan**
**Vegurin langi, 359700**

**Bilasolan.fo**

# Bussar til øll endamál

Í Føroyum og uttanlands







Loysnir 214452

MOURITSEN´S BUSSAR

Tel 32 21 21 · mb@mb.fo

#ALTBERTIL

# SKELTI OG BANNARAR Í ØLLUM STØDDUM

## HUGSA STÓRT HUGSA FØROYAPRENT

Á Føroyaprent hava vit ein framkomnan skeltiverkstað, har vit gera alt frá stórum skeltum við lýsandi stavum til smá navnaskelti **– ALT BER TIL!**
**Bannarar til tiltøk fáast eisini hjá okkum.** Vit skera út á okkara nýggja skeriborði. Bilin prýða vit við foliu, um tú vilt síggjast. Ring, støkk inn á gólvið, fá eitt gott tilboð.

Tel. 314555 www.foroyaprent.fo

Føroyaprent



Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar

FAROE SHIP




WAAG
Tel. 613666

VREDESTEIN

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP







**H71-RK Maribor Branik**

*Myndir: Álvur Haraldsen*













## GÓÐ
GÓÐSKA TIL
LÁGAR PRÍSIR

## BETRI
HØG GÓÐSKA
TIL SÁMULIGAR PRÍSIR

## BEST
TOPP GÓÐSKA
TIL GÓÐAR PRÍSIR










**XL-BYG BORG |** RUNAVÍK TEL. 477272 · KLAKSVÍK TEL. 455119 · TÓRSHAVN TEL. 350500

## H71

1 ANNIKA **FRÍÐHEIM PETERSEN**

2 KARIN **HOLM SIMONSEN**
3 SILJA **SÁMALSDÓTTIR**
4 ANNA **Á STEIG**
5 BÁRA **HANSEN**
6 BJØRK **BRIMNES**
7 MARIA **HALSDÓTTIR WEYHE**
8 KARINA **EYSTURTÚN RUBEKSEN**
9 MARITA **MORTENSEN**
10 EVA BARBA **ARGE**
11 DURITA **TOFTUM JOENSEN**
13 SÁRA **JACOBSEN**
14 SUNNIVA **BOGADÓTTIR**
15 VÁR **BENTSDÓTTIR ZACHARIASEN**
17 LÍV **BENTSDÓTTIR ZACHARIASEN**
18 ELISABETH **HOLM SIMONSEN**
20 CHRISTINA **TURIÐARDÓTTIR ARGE**
96 SOFIE **SØBERG LARSEN**
99 GUÐRIÐ **BOGADÓTTIR Á BORG**

VENJARI: EINAR JÓNSSON
HJÁLPARVENJARI: HALLUR DANIELSEN
MÁLMANSVENJARI: DEJAN LACOK

## KYNDIL

1 JOVANA **STRANJANAC**
12 ALDA **AV SKARÐI**

2 ANJA **ELIASEN**
4 BÁRA **KROSSTEIG HANSEN**
5 BEINTA **BÁRÐARDÓTTIR**
6 ÁSLEYG **SÚNADÓTTIR**
7 BEINTA **LINDBERG HANSEN**
8 BJØRT **KROSSTEIG**
9 NATASJA **HAMMER**
10 SÚNA **KROSSTEIG HANSEN**
11 TURIÐ **ARGE SAMUELSEN**
13 STEFANIE **LAURSEN**
15 SÓLJA **POULSEN**
17 KARIN **SKYLV MIDJORD**
18 HALLA **SKYLV MIDJORD**

VENJARI: BÁRÐUR JOHANNESEN
VENJARI: JULIAN JOHANSEN
LIÐLEIÐARI: SÚSANNA KROSSTEIG HANSEN



## Støðan SMS-kvinnur:

| Nr. Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| **1. H71** | **5** | **152** | **119** | **33** | **10** |
| 2. VÍF | 5 | 147 | 110 | 37 | 8 |
| 3. Kyndil | 4 | 112 | 67 | 45 | 6 |
| 4. Neistin | 5 | 117 | 111 | 6 | 4 |
| 5. StÍF | 5 | 109 | 153 | -44 | 4 |
| 6. Stjørnan | 5 | 110 | 136 | -26 | 2 |
| 7. VB | 5 | 103 | 154 | -51 | 0 |

FM-endaspæl (1.–4.)

**GG! Støðan, áðrenn VÍF-Kyndil mikukvøldið.**



# Betri Ung

## Vit eru har, sum tú ert

Netprát · Telefon · Teldupost · Kjatt · Skype · Facebook · Instagram

## Betri fyri teg

- Ókeypis Netbanka
- Ókeypis kontur
- Ókeypis  gjaldskort
- Ókeypis at veksla valuta
- Ókeypis Boðtænastu
- Avsláttur av tryggingum
- Góðar uppsparingarmøguleikar
- Lestrarkreditt við sera lagaligum treytum
- Ungdómslán við lágari rentu
- Ungdómskundaráðgevar kring landið

Les meira á betri.fo/ung

betri